## DAGSINS MEINING

# Kina sum heimsveldi

Stórar broytingar henda á altjóða pallinum í hesi tíð. Í Suðuramerika eru stórar rembingar, har alsamt fleiri lond fáa vinstravend stýri. Ríka oljulandið Venzuela ber seg at sum eitt nýtt stórveldi, ið bjóðar USA av. Í Miðeystri hevur Iran átikið sær leiklutin sum nýggja stórveldið har, ið eisini hevur lagt seg út við USA serliga, og í fjareysturi royna India og Kina at leggja seg út í kappingina við USA sum tvey komandi nýggj heimsveldi.

Stórur spenningur er í fleiri heimspørtum, og her er tað fyrst og fremst oljan, sum er orsøkin. Olja merkir vald. Kina, sum uttan iva liggur fremst, tá tað snýr seg um at geva USA kapping á altjóða pallinum, er farið at nærkast okkara parti av heiminum. Í hesum døgum er landið við at fáa fótin fastan í fleiri afrikonskum londum, og Kina hevur so eisini nógv at bjóða tilafturskomnu londunum afturfyri at kunna fáa fatur á teirra oljutilfeingi. Tað er ikki sørt, at søgan endurtekur seg. Fyrr vóru tað europeisk lond, sum fingu fótin fastan í Afrika, nú roynir Kina seg.

Kina hevur longu fingið lut í týðandi leitiloyvum eftir olju og gass í Afrika. Afturfyri ger landið stórar íløgur í eitt nú undirstøðukervið, sum í dag er sera lítið úbygt. Hetta er sjálvandi sera kærkomið fyri fleiri lond í Afrika, sum í dag hava tørv á íløgum til menning av ymsum slag. Europa og USA hava ikki víst tann stóra áhugan at gera íløgur í Afrika, og tí kemur tann "hjálpandi hondin" úr Kina væl við. Ikki minst síggja lond, sum hava einaræðisharrar, samstarvið við Kina, sum sera kærkomið. Tí kinesisku leiðararnir gera ikki mun á demokratium og einaveldum, tá teir fara undir samstarv. Tað meta teir sum eitt innanhýsis mál fyri londini. Hetta gevur einaræðisharrum frítt spæl og kunnu teir eisini brúka oljupengarnar teir fáa frá Kina til at keypa vápn fyri.

Kina hinvegin brúkar eisini samhandilin við Afrika til at fáa hesi londini at stuðla sær á týðandi altjóða leikpallum so sum ST. Ein fyritreyt fyri at Kina kann gerast eitt heimsveldi er stuðul frá eitt nú afrikonskum londum.

Samhandilin við Kina hevur sjálvandi stóran týdning fyri Afrika. Men hann hevur so eisini eina slagsíðu. Kina útflytir bíligar nýtsluvørur til londini, og tað gongur so út yvir lokala ídnaðin og handverkið. Eisini taka kinesarar við sær heimanífrá øll arbeiðsfólkini, tá vegir og annað verður gjørt. Tað hevur eisini negativa ávirkan á londini.

Samanumtikið er kinesiska innrásin í Afrika tí bæði góð og ring fyri londini. Góð tí nýggjar íløgur verða gjørdar í eitt nú manglandi infrastruktur, men ring, tí at hjálpin úr Kina hvørki skapar arbeiðspláss ella mennir heimliga ídnaðin.

**Sosialurin**

## VIÐMERKINGAR

# Sambandsflokkurin vinnarin í veljarakanning



**MARJUS DAM**
løgtingsmaður

Sambandsflokkurin einasti flokkur ið fær ein tinglim afturat.

Tjóðveldið mist knapt 1% síðan seinastu veljarakanning.

Tað undrar stórliga, at nú ið ein nýggj veljarakanning er gjørd, ið gevur Sambandsflokkinum ein tinglim afturat, so verður blást upp, at Tjóðveldisflokkurin, ið ongan tingsess fær afturat er tann stóri sigurharrin í kanningini. Enn meira undrar tað, tá hugsað verður um, at Tjóðveldið hevur mist 0,5% síðan seinastu veljarakanning. Tað gongur jú afturá hjá Tjóðveldinum.

Hetta minnir um manipulatión. Og tað er jú tað, ið serliga leiðslan hjá Tjóðveldinum dugir best. Tí hugsar ein um Tjóðveldisflokkurin hevur havt ein fingur við í sjálvari framløguni.

Nú var eg ikki til sjálva framløguna. Men tað tykist, sum um blaðfólk so dyggiliga eru tikin við nøsini av tí ella teimum, ið hava lagt fram. Er tað ein ella fleiri persónar, ið hava tilknýti til Tjóðveldisflokkin, ið hava lagt kanningina fram? Eg spyrji bara.

Um blaðfólkini ikki eru tikin við nøsini, fer ein at spyrja seg sjálvan, um einstøk blaðfólk eru óheft ella íheft ávísum flokkin.

Hví eg sigi tað?

Jú, eftir seinasta løgtingsval gjørdist Sambandsflokkurin nógv størstur í prosentum. Nummar 3 var Tjóðveldisflokkurin. Tjóðveldisflokkurin var tá útnevndur til vinnara, hóast hann var 3 størsti flokkur. Sambandsflokkurin, ið var nógv tann størsti flokkurin, var útnevndur til tapara av valinum. Eitt sindur undarligt. Men – tá var hugt eftir tingsessum - Tjóðveldi fekk 8 ímeðan Sambandið fekk 7 mandatir.

Nú Tjóðveldisflokkurin stendur í stað, tá hugsað verður um tingsessir, og Sambandsflokkurin gerst tann stóri vinnarin við einum tinglimi afturat – so verður heilt "elegant" skift aftur frá tingsessum til prosentir. Hetta skiftið ímillum tingsessir og prosentir tænir so bert einum endamáli – nevniliga manipulatión – til frama fyri Tjóðveldisflokkin.

Ella er tað ikki so – blaðfólk á Sosialinum? Eg vóni at fáa eitt svar.

Eg vóni somuleiðis, at fremsta síða á Sosialinum kemur við eini feitari yvirskrift- nevniliga at Sambandið er vinnarin. Tí vit vunnu ein tingsess afturat – sum einasti flokkur á Løgtingi.

Og til blaðfólk á Sosialinum: – latið tykkum ikki misnýta av Tjóðveldisflokkinum. Teir duga at manipulera sum fáur.

Annars, so velur umleið 4 hvør veljari eisini Sambandsflokkin – til kunningar, tað vísir sama kanning.

# Asfalt – púra einfalt



**BOGI ANDREASEN**
fyriskipari

Asfalt hevur einans eitt endamál og tað er at betra um umstøðurnar og menna føroyska tónleikaumhvørvi, tí harmar tað okkum, at Beate L. Samuelsen eftir øllum at døma hevur misskilt tiltakið og okkara samstarv við Miðlahúsið.

Vit settu okkum fyri, tá vit arbeiddu við at fyrireika tiltakið, at umráðandi var við nógvum og góðum samstarvsfeløgum, sum kundu verða við til gera tiltakið til veruleika og sum vildu verða við til at slóða fyri eini menning av føroyskum tónleiki. Hetta eydnaðist væl og eru vit sera takksom fyri alla ta vælvild og tann stuðul, vit hava fingið til tiltakið.

Tað er onki nýtt í, at tónleikatiltøk samstarva við ein blaðmiðil. G! Festivalurin hevur í fleiri ár havt eina samstarvsavtalu við Dimmalætting, Mjús hevur eisini gjørt samstarvsavtalu við Dimmalætting og Asfalt valdi at gera eina samstarvsavtalu við Miðlahúsið.

Sosialurin bjóðaði ikki til after-party, tað gjørdi Asfalt. At Miðlahúsið stóð á tí svarta armbandinum, sum gav atgongd til after-party, hevði sína púra natúrligu orsøk. Á Asfalt vóru nemliga fýra ymisk armbond. Eitt hvítt, har Føroya Banki stóð á. Eitt blátt, har Tórshavnar Býráð stóð á. Eitt pink, har Faroe Jet, stóð á og eitt svart, har Miðlahúsið stóð á.

Hesi fýra vóru høvuðsstuðlarnar hjá Asfalt, tí stóðu tey á hvør sínum armbandi, so einfalt er tað.

Vit vilja fegin takka bæði Beatu og øllum teimum, sum á ymiskan hátt hava verið við til at gjørt Asfalt til veruleika og vóna, at bæði hon og onnur komandi árini vilja stuðla tiltakinum, sum hesaferð eydnaðist stak væl.

## Yvirlýsing frá Havnar Framburðsfelag

*Fólkaflokkurin í Havn*

Havnar Framburðsfelag vil hervið gera greitt, at felagi hevur fult álit á Bjarna Djurhom og stuðlar honum fult. Havnar Framburðsfelag tekur ikki støðu til sjálvt málið sum er íkomi viðvíkjandi Framtaksgrunninum, ásannandi, at hetta einans er ein roynd hjá andstøðuni og mótstøðufólki at fella hann.

**Innsent tilfar**

Av tí at vit fáa rættuliga nógv innsent tilfar sendandi – meira enn vit fáa í blaðið – hevur blaðleiðslan verið noydd at gjørt nakrar avmarkingar.
Enn sum áður skal fult navn skal vera undir øllum innsendum greinum – annars verða tær ikki prentaðar. Harnæst tilskila vit okkum rætt til at ikki at taka við tilfar, sum eisini er sent øðrum bløðum ella hevur verið prentað aðrastaðni. Drúgvar greinar – greinar sum eru longri enn áleið 5.500 tekn, verða raðfestar lægri, og koma bert í blaðið, um pláss er fyri teimum. Tað er ein fyrimunur um vit fáa tilfarið umvegis teldupost ella á diskli.


**Sosialurin**

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo
**Redaktiónssekreterur:** Inna Törnroos inna@sosialurin.fo
**Fíggjarleiðari:** Tóki Højgaard toki@sosialurin.fo
**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo
Durita Simonsen durita@sosialurin.fo
Finnbjørg Nattestad finnbjorg@sosialurin.fo
Gudny Langgaard gudny@sosialurin.fo
Henrietta Hammer henrietta@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Snorri Brend snorri@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo
Anna V. Ellingsgaard anna@sosialurin.fo
Eydna Skaale eydna@sosialurin.fo
Rigmor Dam rigmor@sosialurin.fo
Lív Højsted Horsdal horsdal@sosialurin.fo
Rólant Waag Dam rolant@sosialurin.fo
Heini Kristiansen heinik@sosialurin.fo

**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo
**Myndamenn:**
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo

**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 228814
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo

**!!! Haldarar**
sum ikki hava fingið blaðið, kunnu ringja til 341818 og boða frá, leygardag tó frá kl. 11.00-13.00

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Føroyaprent
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin
**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Tórsgøta 1, 100 Tórshavn
Tel. 341800, Fax 341801
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 14[00]

**Lýsingar**

| **Freistir:** | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Mánadagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Týsdagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Frí. kl. 10 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Stødd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39mm og rúmið millum teigarnar er 4mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðsl-an ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.